Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Hammer, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Herjólfur sum avloysaraskip hjá Smyrli

Spurningar:

1. Hvussu verður ferðaætlanin við nýggja avloysaraskipinum á suðuroyarleiðini?
2. Hvussu leingi tekur tað at sigla til meginøkið og aftur?
3. Hvussu stór alda ella harður streymur skal vera, áðrenn túrar verða avlýstir?
4. Hevur Herjólfur stabilisatorar?
5. Hvussu skal ítrótturin skipa seg hesa tíðina?
6. Hvussu skulu pendlarar skipa seg?
7. Hvussu skulu arbeiðsplássini skipa seg?
8. Hvussu skal vinnan fáa somu nøgd av farmi til og av oynni hesa tíðina?

Viðmerkingar:

Tá Smyril skal í dokk, verður hann væntandi burtur í 7-8 vikur hesaferð. Tað er greitt, at avloysaraskipið – Herjólfur III – hevur pláss fyri 530 fólkum, meðan Smyril hevur pláss fyri 975 ferðafólkum.

Herjólfur er 70,5 metrar til longdar. Til samanbering var gamli Smyril (Mols) 92,66 metrar. Altso, Herjólfur er 22,1 metrar styttri enn “gamli” Smyril og 67,5 metrar styttri enn verandi Smyril.

Hesa vikuna hevur virkandi stjórin á Strandferðsluni sagt við útvarpið - smáar tveir mánaðir, áðrenn Smyril skal í dokk - at arbeiðsplássini í Suðuroynni sjálvi mugu finna út av fraktini.

Tað fer at ávirka ítrótt, pendlarar, arbeiðspláss og framleiðslu í Suðuroynni, at Herjólfur tekur færri ferðafólk og umstøðurnar til bilaflutning og farmaflutning verða nógv skerdar.

Fyri at fáa greiðu á, hvussu landsstýrismaðurin ætlar at loysa hendan trupulleikan, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 16. juni 2022

Bjarni Hammer